# Stór veljarakanning í Sosialinum

VAL 2004-01-08
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Sosialurin fer í týsdagsblaðnum at kunngera úrslitið av stórari veljarakanning, sum varð gjørd undan vikuskiftinum. Fyri Fynd og Sosialin og í samstarvi við Føroya Tele ringdu næmingar á Klaksvíkar HF-skeiði og Studentaskúlanum á Kambsdali til knappliga 3000 veljarar. Úrslitið av kanningini verður roknað út á tey sjey valdømini. Saman við kanningini, sum varð gjørd fyri Sosialin undan løgtingsvalinum í 2002, er hetta størsta veljarakanning, sum nakrantíð er gjørd í Føroyum.



*Næmingar á  Klaksvíkar HF-skeiði og Studentaskúlanum á Kambsdali sótu hóskvøldið í hølinum hjá Føroya Tele í Klaksvík og gjørdi veljarakanning. Teknarin hjá Føroya Tele, Áki Justinussen leggur teimum lag á*

*Mynd Bárður Lydersen*



*Jóannes Hansen, samfelagsfrøðingur og lærari á HF-skeiðnum í Klaksvík og Studentaskúlanum á Kambsdali fær her seinastu tingini uppá pláss saman við leiðaranum hjá Føroya Tele í Klaksvík, Poul Sundskarð*

*Mynd Bárður Lydersen*









